# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*"Kuba er ein sermerkt uppliving, og ferðslan er søga fyri seg"*

*Terji og Jóhan David um Kuba-ferðina*

Adria Classica 743 UP:

# Størsti kampingvognur í landinum




*Adria Classica 743 UP er nógv størri enn ein vanligur kampingvognur*

## FAKTA

Fyritøkan Stubbin varð sett á stovn í Kvívík fyri einum góðum ári síðan. Nú er Stubbin fluttur til Vestmanna í høllina hjá Vestmanna Timburhandli.

Stubbin hevur eitt stórt úrval av bátum, húsvognum, teltvognum, viðfestisvognum, leysamotorum, navigatiónsútgerð og mongum øðrum. Umframt Adria kampingvognar umboðar fyritøkan eisini kampingvognar av merkinum Hobby. Opið er frá mánadegi til fríggjadag frá kl. 9 - 17.30 og leygardag frá kl. 10 - 14, telefonnummarið er 471800.



*Innan er vognurin sum eini sethús við t.d. sentralhita og hita í gólvinum*



*Sovikamar við dupultsong, tilsamans eru 5-6 seingjapláss.*

**Tað eru ikki einans motorsúkklurnar, sum verða seldar sum heitt breyð í hesum døgum, sølan av kampingvognum hevur sanniliga eisini tikið dik á seg. Adria Classica 743 UP er størsti kampingvognur, sum er fluttur inn í landið**

KAMPING

Fyritøkan Stubbin í Vestmanna hevur fingið tann største kampingvognin, sum nakrantíð er fluttur inn í landið. Talan er ein Adria Classica 743 UP, sum kann kallast eitt summarhús á hjólum.

Vognurin er nógv størri enn ein vanligur kampingvognur, sum er 2,30 m breiður og umleið 5 m langur. Hesin er 2,50 m breiður og 7,43 langur. Vognurin vigar 1.600 kg og totalvektin er 2 tons. Prísurin á vogninum er kr. 180.980,-

At koma inn í vognin er sum at koma inn í eini sethús, har er sentralhiti og hiti í gólvinum, annars er t.d. komfýrur, bakarovnur, køliskáp, frystiboks, sjónvarp við DVD og radio við fløguspælara. Har er eisini sovikamar við dupultsong, tilsamans eru 5-6 seingjapláss. Samlaða gólvvíddin er 18 fermetrar.

Kári Hansen frá Stubbanum sigur, at ein slíkur kampingvognur er væl egnaður sum summarhús. Møguleiki er at ferðast kring landið og uttanlands. Í Føroyum ber væl til at hava vogin við sær, har ein sjálvur ynskir tað.

Bilur til sølu




Ein væl hildin Daewoo Lanos 1,6 til sølu um hóskandi boð fæst. Bilurin er árgang 2001, hevur koyrt 70.000 km.

**Prísuppskot: kr. 60.000**

***Tel. 278852***

- Umvæling av tryggingarskaðum og privat skaðum
- Vit umvæla øll bilmerki
- Klárgering til sýn
- Bremsur, útstoyt, stoytdoyvarar, rustarbeiði o.m.a.



Ring og fá eitt tilboð

**Sp/f Plátuverkstaðið**
Falkavegur · Tórshavn · Tel 321778 ella 221778
Teldupostur: plv@plv.fo